# TÍÐINDI

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

# Tvey ferðsluóhapp í gjárkvøldið

**Eingin fekk stórvegis skaða í tveimum álvarsligum ferðsluóhappum í Eysturoynni í gjárkvøldið**

FERÐSLA
*Teitur Joensen*
*teitur@sosialurin.fo*

Í gjárkvøldið bleiv løgreglan í Runavík tilkallað til eitt ferðsluóhapp, sum var hent í rundkoyringini omanfyri Norðskála.

Ein bilur setti brádliga ferðina niður í rundkoyringini, og bilurin aftanfyri megnaði akkurát at steðga. Triði bilurin var tó ikki so heppin, og hann rendi í reyvini á næsta bilinum, sum síðani rendi á fremsta bilin.

Beint sum løgreglan var komin til rundkoyringina, fingu teir fráboðan um enn eitt ferðsluóhapp, sum var hent hinumegin tunnilin, og sambært løgregluni ljóðaði hetta óhappið rættiliga álvarsamt.

Teir vóru skjótir á staðnum, og har var ein bilur við tveimum ungum monnum koppaður runt á vegnum. Annar teirra var blivin fastur undir bilinum, men tá løgreglan kom á staðið fingu teir mannin út, og báðir blivu sendir á landssjúkrahúsið.

Bilurin, sum teir báðir ungu menninir koyrdu í, var stutt sagt í knúsi, og sambært løgregluni hendi óhappið, av tí at telefonin hjá føraranum júst ringdi. Tá hann so skuldi taka hana, misti hann tamarhaldi á bilinum.

Lukkutíð fyri teir báðar ungu menninar fekk eingin álvarslign skaða í óhappinum.



*Eitt álvarsligt ferðsluóhapp hendi inni í Eysturoynna í gjárkvøldið, men lukkutíð kom eingin til skaða.*

*Mynd: Símun Abrahamsen*

www.sosialurin.fo

ALTJÓÐA BLÓÐGEVADAGUR
í miðlahúsinum

**Í sambandi við Altjóða Blóðgevadagin hósdagin 14. juni skipar Felagið Blóðgevi fyri hugnaløtu í miðlahúsinum hendan dagin kl. 19.30**

Bjarni á Steig, yvirlækni og serlækni í blóðsjúkum heldur fyrilestur um blóðgávu og um, hvat blóðið kann nýtast til í viðgerðini av ymiskum sjúkum

Starvsfólk í blóðbankanum greiða frá, hvussu blóðgáva fer fram, og hvussu blóðið verður viðgjørt í bankanum

Eisini verða nøkur hagtøl frá blóðbankanum løgd fram

**Sum undirhald verður sangur og tónleikur.**

Nýggir blóðgevar fáa høvi til at melda seg til. Tiltakið kostar einki, og Felagið Blóðgevi vónar at nógv fólk møtir á fund




Tórsgøta 1 · Tel 34 18 00 · Fax 34 18 01
post@sosialurin.fo · www.sosialurin.fo

miðlahúsið í Vágsbotni

# Svínoy á veg til Klaksvíkar

Klaksvíkar kommuna og Svínoyar kommuna hava gjørt ein sáttmála um at leggja kommunurnar saman frá næsta valskeiði. Tað visti Útvarpið at siga mánadagin.

Um tríggjar vikur verður borgarafundur í Svínoy um samanleggingina, og síðani skal fólkaatkvøða verða í oynni.

-Eldrasambýlið, sum skal byggjast í Svínoy, er beinleiðis orsøkin til, at kommunan nú verður partur av Klaksvíkar kommunu, sigur Eyðun Jacobsen, borgarstjóri í Svínoy, við Útvarpið.

Borgarstjórin í Klaksvík, Steinbjørn Jacobsen, væntar, at Norðoyggjar verða ein kommuna um ikki so langa tíð.

KJ NORÐ TRUKK SÓKNAST EFTIR:

**Lærlingi til maskinsmið**



Til verkstað okkara, KJ Norð Trukk í Tórshavn, sóknast vit eftir lærlingi til maskinsmið at byrja beinanvegin.

Lærutíðin er 4 ár, harav millum ein fjórðing og triðing er skúlagongd. Ástøðiliga undirvísingin fer fram á tekniskum skúla í Tórshavn.

Sendið umsókn til: KJ NORÐ TRUKK, Mykinesgøta 3, Boks 1315, Tórshavn. Att.: Petur Klein, fartel 588842

KREA.FO · TEL 47 80 80

KJ NORÐ TRUKK
TRUKKAR & LYFTIÚTGERÐ

KJ Norð Trukk er umboð fyri Linde gaffiltrukkar, Zepro lyftir og Fassi kranar.
Tað er KJ Hydraulik sum eigur og rekur fyritøkuna KJ Norð Trukk.

Mykinesgøta 3 · Tórshavn
Tel 315136 · Faks 310931